# Suðuroyar Sparikassi setir aftur álitið á VB

*VB og Suðuroyar Sparikassi skrivaðu hóskvøldið undir nýggja sponsoravtalu, sum er galdandi fyri inniverandi kappingarár*




*Avtalan ímillum Vágs Bóltfelag og Suðuroyar Sparikassa varð undirskrivað í Sparikassanum hóskvøldið. Vinstrumegin er tað Maria Vágfjall, kassameistari og næstformaður í VB, og høgrumegin er tað Per Jacobsen, marknaðarleiðari í Suðuroyar Sparikassa. Spælararnir, sum hyggja at, eru Magni Jacobsen, vinstrumegin, spælandi venjarin, Krzysztof Popczynski í miðjuni og Eyðun Jacobsen, høgrumegin*

Áki Bertholdsen

Hóskvøldið skrivaði Suðuroyar Sparikassi og Vágs Bóltfelag undir eina nýggja sponsoravtalu, sum er galdandi í eitt ár, frá 1. januar í ár til 31. desember.

Hetta er størsta sponsoravtala, sum sparikassin ger, tí Per Jacobsen, marknaðarleiðari, dylir ikki fyri, at við hesi avtaluni rýkur bróðurparturin av tí, sum Suðuroyar Sparikassi hevur sett av til slík endamál.

–Men tað er kortini heldur ikki so, at vit ikki stuðla øðrum endamálum eisini, tí tað gera vit, eitt nú kapproðri, sigur Per Jacobsen.

Tá ið sparikassin hevur gjørt eina slíka „høvuðsavtalu“ við VB, er tað tí, at hann hesuferð heldur valdi at savna orkuna um eitt endamál og at stuðla tí ordiliga, heldur enn at spjaða stuðulin ov víða og at stuðla eini rúgvu av ymsum endamálum við smáum upphæddum, sum kanska ikki muna so væl hjá tí einstaka.

–Enn er sparikassin ikki so stórur. Men tað er onki at ivast i, at stuðulsupphæddirnar frá Suðuroyar Sparikassa fara at økjast í takt við at sparikassin sjálvur veksur- og tað gongur avgjørt rætta vegin, sigur hann.

**Miðvíst til verka**

Suðuroyar Sparikassi hevur stuðlað VB í fleiri ár, men tað skilst á báðum pørtum, at í ár er ætlanin at fara meiri miðvíst til verka, enn gjørt er onnur ár.

Umframt at geva sparikassanum ávís rættindi at lýsa á búnum hjá VB og í sambandi við tiltøk hjá felagnum, er eisini ætlanin at gera álvara burturúr eini áseting í sáttmálanum um at seta eina nevnd við umboðum fyri VB og Suðuroyar Sparikassa, sum leypandi skal fylgja avtaluni upp og meta um tað, sum virka væl og at meta um tað, sum kanska ikki virka so væl fyri at fáa tað rættað.

Per Jacobsen dylir ikki fyri, at tá ið avtala er gjørd um at henda avtalan skal vera meiri professionel, enn tær kanska onkuntíð hava verið, so er tað avgjørt tí, at Suðuroyar Sparikassan fegin vil gera meiri vart við seg.

–At vit hava fingið eina deild í Havnini, er ábending um tað sama. Og júst av tí at vit eisini eisini hava fingið deild í høvuðsstaðnum, er Suðuroyar Sparikassi blivin nógv sjónligari, ikki minst tí at deildin í Havn hevur fingið so dygga móttøku-ikki bara frá suðuroyingum í Havn, men eisini frá norðanfjørðsfólki.

Hava nakað burturúr

Marknaðarleiðarin í Suðuroyar Sparikassa dylir heldur ikki fyri, at áhugin fyri at gera sponsoravtalu við sparikassan.

– Tíverri kunnu vit ikki ganga øllum umsóknunum á møti. Men vit vilja fegin fáa nakað afturfyri tann peningin vit brúka til hesi endamálini.

– Og tað er heldur ongin grund at dylja fyri, at tað er hugaligari at stuðla einum felag, sum fær góð úrslit at vísa á.

–Vit vilja fegin vera stolt av tí, sum vit stuðla.

– So hóast tað skuldi kostað sparikassanum eitt sindur eyka, høvdu vit fegin sæð VB úti í evropeiskum kappingum, leggur marknaðarleiðarin afturat.

**Skrivaðu fótbóltssøgu**

Til tey, sum hava áhuga fyri søgu, kann eisini nevnast til stuttleika, at VB var fyrsta fótbóltslið í Føroyum, sum hevði lýsingar á búnanum.

Tað var í 1971 og eisini tá var tað Suðuroyar Sparikassi, sum var stuðul.

Sostatt vóru tað nakrar reglur av føroyskari fótbóltssøgu, sum vóru skrivaðar tá.

Hetta fall tó ikki í góða jørð hjá ÍSF, sum vildi góðkenna tað uttan víðari.

Men VB setti seg ímóti fótbóltssambandinum, og fekk at enda viðhald. Síðani varð reglugerð gjørd fyri, hvussu lýsingarnar skuldi vera.

# Datt stutt fyri málið

*Rógvi Johansen koyrdi leygardagin fyrsta einkultstartin á árinum*

Jákup Mørk

Kanska sterkasti Føroyski súkklarin, Rógvi Johansen, luttók leygardagin í kapping í einkultstarti í Svendborg.

Enn er nakað tíðliga á árinum, og Rógvi sigur seg eisini vera langt frá toppforminum enn, men kortini megnaði hann at koyra seg til eitt sjeynda pláss, og hetta vóru bæði hann og venjari hansara væl nøgdir við.

Sjálvur helt Rógvi, at hann ongantíð kom heilt upp í snúningar undir koyringini, men tá hann so allíkavæl endaði somikið frammaliga, kundi hann ikki annað enn vera nøgdur.

**Datt**

Sunnudagin luttók hann so í Post Cup í Ballerup, sum telist millum stóru kappingarnar í Danmark.

At byrja við gekk rættuliga væl, men eftir at hann koyrt í eitt hol í vegnum, noyddist hann at fáa hjálp frá tænastu bilinum, og hetta seinkaði honum rættuliga nógv.

Hann megnaði tó at koyra hinar súkklararnar uppaftur, men alt stríðið skuldi vísa seg at vera til onga nyttu.

Rógvi var nevnliga fyri einum óhappi, tá bert einir 10 av teimum 183,4 km vóru eftir av kappingini. Ein bólkur upp á einar 15 súkklarar var sloppin leysur, og Rógvi taldist millum teirra, sum jagstraðu bólkin, tá einir tríggir súkklarar rendu saman. Rógvi súkklaði beint aftan fyri hesar, og hevði ikki møguleika at snara undan, so eisini hann endaði í ruðuleikanum.

Rógvi varð beinanvegin fluttur á sjúkrahúsið í Herlev, men hóast hann hevði fleiri smærri snuddir, so var kortini ikki neyðugt at seyma nakað, og sjálvur vónar føroyingurin at verða klárur aftur at súkkla komandi fríggjadag, tá felag hansara aftur luttekur í eini kapping.

# Fimleikaframsýning

*Lyngs Idrætsefterskole, ið er á vitjan í Føroyum, skal á ferðini spæla bæði fót- og hondbólt. Í dag hava ungu danirnir fimleikaframsýning í høllini á Hálsi í Havn.*

Lyngs Idrætsefterskole er skúli, ið liggur á Thyhólmi í norður Jyllandi. Á skúlanum taka næmingar “vanligt” níggjunda og tíggjunda floks prógv, men sera stórur dentur verður aftrat hesum lagdur á ítrótt. Serliga eru tað fimleikur og hondbóltur, ið eru frammaliga.

Skúlin er nýggjur. Hann hevur bert trý ár á baki, men er longu nú sera væl umtóktur.

**Ferðast hvørt ár**

Hvørt ár ger skúlin ferð í annað land. Í ár varð so gjørt av at vitjast skuldi í Føroyum. Føroyskir næmingar hava verið á skúlanum og er gott samband millum “gomlu” næmingarnar og skúlan. Við á ferðini eru 78 næmingar og lærarar.

Á ferðini í Føroyum skulu næmingar á Lyngs skúlanum royna seg bæði í hond- og fótbólti. Í gjár seinnapart var dystur millum gentur 14-17 hjá B36 og genturnar úr Lyngs og mikudagin skulu dreingirnir so royna seg móti dreingjaliðnum hjá B36. Mikudagurin verður annars sera strævin hjá ungu fólkunum, tí henda dag skulu donsku ítróttanæmingarnir eisini spæla móti føroysku ungdómslandsliðunum í hondbólti, ið annars fyrireika seg til EM-undankappingar.

**ikki bert bóltar**

Men tað er ikki bert bóltspælið, ið dentur verður lagdur á á Føroya-ferðini. Skúlin ger nógv við fimleik og í dag hava fólk so høvi at síggja hvat kemur burturúr. Klokkan 16 hava donsku næmingarnir almenna fimleikaframsýning í ítróttarhøllini á Hálsi har øll eru vælkomin.









# Nógv góð hugskot komu fram

*Sunnudagin skipaði Fimleikasambandið fyri sonevndari hugskotssýning á Kambsdali, og ikki kann sigast annað enn at hugskotini vóru nógv í tali*

Fimleikafeløgini, sum luttóku í framsýningini, vóru: Flog, Fok, Ljósið, Havnar Fimleikafelag, Klaksvíkar Fimleikafelag og Støkk.

Umleið 350 fimleikarar vóru komnir saman í ítróttarhøllini á Kambsdali sunnudagin. Her var talan um eina sokallaða „Hugskotssýning“, sum Føroya Fimleikasamband skipaði fyri, og tiltakið eydnaðist sera væl. Høvuðsendamálið við hesi framsýning er at samansjóða fimleikarar úr øllum landinum, og samstundis er hetta ein góður háttur at geva hvørjum øðrum hugskot og íblástur til komandi fimleikaár. Byrjað var longu kl. 13 sunnudagin við upphiting og eini felags seriu, har allir fimleikararnir luttóku. Síðani var okkurt til matna, áðrenn farið varð undir at sýna fram fyri hvørjum øðrum.

Tað vísti seg at hetta var eitt gott tiltak bæði fyri fimleikarar og leiðarar, sum vónandi verður á hvørjum ári

**Myndir: Heri S. Lamhauge**







